# Maria fekk Eik granskingargávuna 2007

Á hátíðarhaldi týsdagin 18. desember í høvuðssætinum hjá Eik yviri við Strond handaði Bjarni Olsen, stjóri, Mariu Dam hina sonevndu granskingargávuna, sum er upp á 50.000 krónur.

Maria Dam er evnafrøðingur við serkunnleika innan eiturvistfrøði og arbeiðir á Umhvørvisstovuni. Hon er norsk og hevur búð í Føroyum í nógv ár.

Í grundgevingini sigur Eik Vísindagrunnurin, at Maria fær granskingargávuna fyri sítt slóðbrótandi arbeiði innan eiturvistfrøði í føroysku náttúruni. Hon hevur slóðað fyri á einum fakøki, sum annars var órørt í Føroyum, og hevur staðið fyri einari ørgrynni av verkætlanum, ið lýsa eiturevni og eiturvistfrøði í føroysku náttúruni - í luftini, vøtnunum, sjónum og á landi.

Eisini í altjóða høpi er hon virkin granskari. Hon hevur hon luttikið í nógvum altjóða verkætlanum og umboðar Føroyar væl í altjóða høpi. Hon hevur prógvað, at hon er granskari á altjóða støði, er slóðbrótari á sínum fakøki í Føroyum og hevur givið okkum nógva virðismikla vitan um eiturvistfrøði í føroysku náttúruni.

Eik Vísindagrunnurin vil við granskingargávuni eggja Mariu til at halda fram við at gera gransking, sum kann koma føroyska samfelagnum til gagns.

**Eik Vísindagrunnurin**

Eik Vísindagrunnurin varð settur á stovn í 1986 av nevndini í Føroya Sparikassa, sum Eik Banki tá æt. Nevndin helt tað hava alstóran týdning, at vitanarstøðið í Føroyum alsamt megnar at fylgja støðinum, sum er í londunum kring okkum. Á henda hátt fekk Eik ein virknan leiklut í at fremja hetta í verki. Endamál grunsins er at veita fíggjarstuðul til vísindaliga gransking av føroyskum evnum, til fyrireiking av útgávu av vísindaverkum um somu evni og í aðrar mátar at stuðla føroyskt vísindastarv.

Fram til dagin í dag hevur grunnurin játtað uml. 3 mió. kr. í stuðli til smærri og størri vísindaligar verkætlanir. Endamálið við granskingargávuni er at veita viðurkenning av tí arbeiði ella teimum evnum, sum móttakarin hevur víst innan gransking.

Í metingarnevndini hava sitið: Andras Mortensen, landsantikvar, ph.d., Eilif Gaard, granskari, dr. phil. Og Turið Sigurðardóttir, lektari, mag.art.



*Bjarni Olsen, stjóri í Eik, handar Mariu Dam granskingargávuna upp á 50.000 krónur*



*Maria Dam og døturnar Thea og Emilia saman við Jákupi Paula Joensen, stjóra á Umhvørvisstovuni*

*Mynd: Eik*

# Jólamatiné leygardagin í Havnar Kirkju

**Jólamatinéin í Dómkirkjuni verður leygardagin 22. desember kl 11:30**



Tiltakið, ið Konsertfelagið skipar fyri, er vorðin rættiligur jólasiður. Væl vitjaðu metinéirnar hava veruliga fingið fótafesti.

Konsertfelagið leggur seg eftir at blanda konsertina við vælljómandi tónum, framførdur av nøkrum av okkara bestu tónleikarum. Eisini onkur av ungu, evnaríku talentunum slepp-ur at royna seg.

Fastur táttur á matinéini er Tórshavnar Manskór, sum fer at syngja jólasangir og sangir, sum passa til jólini. Bjarni Restorff stjórnar.

Dómorganisturin Gudmund Mortensen fer at framføra á orgul.

Berghild Poulsen fer, saman við Árna Hansen á klaveri og Tórshavnar Kanskóri, at syngja hitt vakra "Ave Maria" eftir íslendska tonaskaldið Kaldalón. Eisini fer Berghild Poulsen at syngja "Wie schon leuchtet der Morhenstern" í útseting eftir J. S. Bach. Her luttaka Heiðrun Petersen og Árni Hanen.

Heiðrun Petersen, sum er ein av okkara evnaríkastu violinleikarum, fer saman við Árna Hansen at spæla Meditation eftir franska tónaskaldið Massenet.

Tónleikur fyri sologittara verður eisini á skránni. Ungi skopuningurin Ragnar Olsen fer at spæla brot úr verki eftir J. S. Bach.

Streingjabólkurin Ad Libitum fer, saman við Tórshavnar Manskóri, at framføra "Panis Angelicus" eftir Césat Franck.

Ad Libitum fer eisini at framføra "Jesu bleibet meine Freude" eftir J. S. Bach.

Endað verður við felagssangi av kendum jólasangi.

Konsertin varar í ein slakan tíma og er ókeypis.

Øll eru vælkomin, og tiltakið er stuðlað av Dómkirkjuni, Mentanargrunni Landsins og Konsertfelagnum.

# Maður deyður í ferðsluvanlukku í Vágum



**Vágar:** Ein 31 ára gamal maður lat lív, tá ein bilur fór út av vegnum í Brennuni við flúgvarabedingina í Vágum. Vágaportalurin skrivar, at løgreglan ikki veit nágreiniliga at siga um vanlukkuna, ella um onnur hava verið við í bilinum, og tí varð leitað við hundi. Vanlukkan er helst hend í nátt í myrkrinum, og tí hevur eingin sæð bilin. Ikki fyrr enn í morgun fekk løgreglan boð um hendingina. Vágaportalurin skrivar, at vakthavandi í Havn ikki veit mera at siga um vanlukkana, og heldur ikki, um onnur hava verið við í bilinum, tí løgreglan er framvegis á staðnum og kannr økið.